## Mest til byggibúning

Sandavágs kommuna ætlar at brúka 6,3 mió. krónur til íløgur næsta ár. Av hesum fara 3,1 mió. krónur til byggibúning. Arbeiðið fevnir um at gera útstykkingina í Sørpum lidna, og ein partur av pengunum skal brúkast til at keypa lendi til nýggja útstykking. Av tí, sum eftir er av játtanini til íløgur, fara tvær mió. krónur til barnaansing. Fíggjarætlanin hjá Sandavágs kommunu næsta ár javnvigar við 24,6 mió. krónum

## Dýrt at snúsa

Svenska heilsustýrið vil hava sviar at gevast at snúsa, tí tað kann elva til krabbamein í munninum og búkspýttkirtlinum, og nú hava politikararnir gjørt av at leggja uppaftur størri trýst á snúsararnar. Tað verður gjørt við at hækka avgjaldið á snúsi so nógv, at tað verður munandi dýrari at fáa sær upp í nevið. Sum er kostar ein pakki við 50 grammum av snúsi 26 svenskar krónur, men eftir nýggjár fer hann at kosta 37 krónur.

# Føroyska alduorkuætlanin millum tær bestu

**Ólavur Gregersen, stjóri á SeWave Bitland, hevur verið í Týsklandi á ráðstevnu um alduorku, har ið tey høvdu eina framløgu um alduorkuætlanina í Føroyum. Tann føroyska ætlanin er tann, sum hevur frægast møguleikar at klára seg, segði ein ES-embætismaður við Ólav eftir framløguna**

ALDUORKA
*Heini S. Kristiansen*
*heinik@sosialurin.fo*



*Ólavur Gregersen, stjóri á Sewave Bitland, hevur verið á ráðstevnu um alduorku í Týsklandi*

Ólavur Gregersen hevur verið í Týsklandi á einari ráðstevnu um alduorku, sum ES skipaði fyri. Á ráðstevnuni vóru mestsum øll, sum arbeiða við alduroku. Umboð fyri verkætlanirnar, sum hava fingið stuðul frá ES, vóru á staðnum.

– Tað var sera spennandi at vera har. Har vóru nógvir týðandi persónar innan alduorku, og tað var ein stevna við høgum fakligum støði, sigur Ólavur.

Ráðstevnan gav Ólavi ein mynd av, hvussu langt hini, sum arbeiða við alduorkuverkætlanum, eru komin.

– Eg fekk eina fatan av, hvar onnur vóru í mun til okkum. Eg kann staðfesta, at tað er langt á mál, áðrenn alduorka kann gerast lønandi. Vit tosa helst um 10 - 15 ár, áðrenn vit kunnu tosa um at koma uppá sama støði sum vindorka er í dag, sigur Ólavur.

### Føroyska verkætlanin einastandandi

Eftir framløguna fingu teir nógvar positivar viðmerkingar frá øðrum luttakarum á ráðstevnuni.

– Ein enskur proffesari, sum hevur arbeitt við alduorku í 20 - 30 ár, segði við meg, at okkara verkætlan er einastandandi. Tað sama segði ein embætismaður hjá ES, sum helt, at okkara verkætlan er ein av teimum fáa, sum hevur ein veruligan møguleika at klára seg og gerast lønandi.

Tað serliga við føroysku verkætlanini er, at teir ætla at spreingja hol inn í bergið og hava alduorkuverkið har.

– Vit leggja okkum eftir at fáa fatur á alduni, har ið hon hevur mest orku. Tí fara vit, har nógv brim er. Har er bergið hent, tí at tað verjir verkið. Ein annar fyrimunur er, at alduorkuverkið hvørki sæst ella hoyrist, sigur Ólavur

### Hava møguleika fyri stórrakstri

Føroyska alduorkuskipanin leggur upp til, at byggjast kunnu fleiri orkuverk fram við berginum. Hetta Landslagið í Føroyum ger, at verkætlanin kann koma at bera seg.

– Hugskotið leggur upp til, at ein røð av turbinum kunnu byggjast upp framvið berginum. Hetta ger, at vit kunnu hava stórrakstur. Tað er nakað, sum mangan er torført, tá ið vit tosa um alduorku, sigur hann.

Ráðstevnan hevur verið eitt gott upplivilsi fyri Ólav, og tað hevur givið eyka íblástur at halda fram við verkætlanini.

– Hetta hevur verið eitt rættiliga positivt upplivilsi. Vit arbeiða framvegis við at fáa síðstu pengarnar til høldar, so at vit kunnu byrja at byggja eitt royndarverk. Tað er tó ikki lætt at fáa fígging. Vit mangla umleið 15 milliónir, men flestu íløgugrunnar halda, at tíðarskeiðið er ov langt, áðrenn íløgan kann geva avkast, sigur hann.

### Kunnu verða slóðbrótarar

Ólavur heldur, at hetta kann gerast ein góður møguleiki hjá føroyingum, um vit koma í gongd og arbeiða miðvíst.

– Um vit arbeiða skjótt og miðvíst, kunnu vit gerast fremst á økinum. Vit kunnu vera slóðbrótarar og gera okkara vitan galdandi. Vit síggja eitt dømi í Danmark, har ið danir vóru eitt stig frammanfyri hini innanfyri vindorku. Av tí, at at teir vóru 10 - 15 ár frammanfyri hini londini, hava danir eisini ein størri part av marknaðinum í dag.

– Tað sama kann henda hjá okkum, um vit megna at verða fyrst, sigur Ólavur at enda.

# Nólsoy skal verða sjálvberandi við orku

**Ein verkætlan við vetnisorku skal roynast í Nólsoy. Ætlanin er, at Nólsoy skal verða sjálvberandi innan orku. - Vetnisorka er bíligari, og tað er grøn orka, sigur Bjarti Thomsen**

VETNISORKA
*Heini S. Kristiansen*
*heinik@sosialurin.fo*



*Bjarti Thomsen er formaður í nevndini fyri Nólsoyar orkufelag. Hann sigur, at vit kunnu vænta at síggja okkurt ítøkiligt til várs*

**Nólsoy:** Bjarti Thomsen er formaður í nevndini fyri Nólsoyar orkufelag. Felagið varð stovnað 27. august, og nevndin skipaði seg 15. oktober. Nevndin fer at arbeiða við orkuætlanini hjá landsstýrinum í Nólsoy. Landsstýrið vil fegin hava tey lokalu við í arbeiðið, og nólsoyingar vilja fegin hava ávirkan á tær avgerðir, sum verða tiknar.

– Hetta sprottið úr einari norðurlendskari orkuætlan, sum skal menna útjaðaran. Meiningin er at fáa útjaðaran sjálvberandi við orku. Nólsoyggin er hóskandi í støðd, og tí varð hon vald, sigur Bjarti, sum er spentur uppá verkætlanina.

### Máta nýtsluna

– Tað er spennandi at fáa virksemi út á oynna. Tað er eisini spennandi at vera slóðbrótari og at vera við í onkrum innovativum, sigur hann.

Arbeiðið er higartil á einum byrjunnarastøði. Tey hava sett málarar á oljufýringarnar í húsunum í Nólsoy, so at teir kunnu fáa eina mynd av, hvussu nógv íbúgvarnir nýta av orku.

– Talan er um vetnisorku. Vindmyllur verða settar upp, og vit vinna orkuna í vindunum og varðveitta hana við vetni. Myndugleikarnir ætla at gera Nólsoynna sjálvberandi. Hetta er ein spennandi verkætlan, sum eisini inniber grøna orku. Hetta er sera viðkomandi, nú tað verður tosað nógv um Kyoto-sáttmálan. Um vit vinna meira orku við vetni, kunnu vit minka um koltvíilt útlátið, sigur Bjarti.

### Føroyska veðurlagið væl egnað

Føroyska veðurlagið er væl egnað til vetnisorku.

– Tað er tvífalt so nógvur vindur um veturin sum um summarið, og tað sær út til, at vit nýta tvífalt so nógva orku um veturin enn um summarið. Tískil hóskar veðurlagið væl til okkara nýtslu. Vit hava eisini meira vind her, enn tey hava inni á evropeiska meginlandinum.

– Tað verður spennandi at nýta vindorku til at hita húsini upp við. Oljan kostar nógv, og hon fer helst at dýrka komandi árini. Tað sær út til at loysa seg longu í dag at satsa uppá vetnisorku. Ein annar fyrimunur er, at tað er grøn orka, sigur Bjarti.

Enn eru tey í holt við fyrireikandi arbeiði, men vit kunnu vænta okkum at síggja okkurt ítøkiligt í vár.

– Vit eru í holt við at kortleggja nýtsluna, og aftaná skal eitt uppskot gerast. Til várs kunnu vit vænta at síggja okkurt ítøkiligt, sigur Bjarti Thomsen at enda.